# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á Sopot-festivalurin hava so kend nøvn luttikið sum Johnny Cash, The Tempations, Paul Young, Chuck Berry, Annie Lennox, Ricky Martin, Whitney Houston, Lionel Richie, The Corrs, Bryan Adams og Charles Aznavour*

# Lena syngja á stórum festivali í Póllandi



*Pólskt sjónvarp hevur boðið Lenu at koma á tann stóra Sopot-fetsivalin í ár*

**Lena Anderssen er boðin at luttaka á tí stóra Sopot-festivalinum, sum verður í Póllandi í september**

TÓNLEIKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Ein av Føroya fremstu songfuglum, Lena Anderssen, er seinastu árini vorðin ein av okkara kendastu tónleikaambassadørum uttanlands, og serliga seinastu árini hava vindarnir borið hennara flog víða.

Eftir m.a. at gjørt upptøkur í Abbey Road í London fyrr í ár, gongur leiðin fyrsta vikuskifti í september til tann stóra Sopot-festivalin í Póllandi. Festivalurin bleiv fyrstu árini fyriskipaður av polska ríkissjónvarpinum, Telewizja Polska ella TVP, men nú hevur tann privata støðin TVN yvirtikið festivalin.

Lena er boðin at koma hagar, eftir at sjónvarpsstøðin vendi sær til umboðsmannin hjá Lenu.

Sopot-festivalurin hevur gott orð á sær, og sæst hetta eisini á nøvnunum á teimum mongu tónleikarunum, sum hava sungið spælt har, síðani festivalurin byrjaði í 1961. Á festivalum kunnu nøvnini sjálvandi vera misjøvn, men úr rúgvuni kunnu millum onnur nevnast Johnny Cash, The Tempations, Paul Young, Chuck Berry, Annie Lennox, Ricky Martin, Whitney Houston, Lionel Richie, The Corrs, Bryan Adams og Charles Aznavour.

Ta fyrstu tíðina í sekstiárunum varð festivalurin skipaður sum ein sangkapping og bleiv tí ofta samanborin við Eurovision Song Contest.

Seinni broyttist festivalurin eitt sindur, og síðani sjeytiárini hevur hann verið ein av teimum fremstu í Eysturevropu, og av tí at ein sjónvarpsstøð er við í fyrireikingunum, verður tilfar frá festivalinum varpað út til eina milliónastóra áhoyrarafjøld.

Tað er kortini ikki bara í Póllandi at Lena verður at hoyra í ár. Hon skal nevniliga eisini syngja á Summarfestivalinum í Klaksvík í ár.

Avgreiðslutíðir í summar



Frá 17. juli til 11. august eru avgreiðslutíðir okkara broyttar. Móttøkurnar hava opið og telefonirnar verða tiknar:

Mánadag til fríggjadag frá kl. 10 til kl. 13

Frá mánadegi 14. august verður opið aftur sum vanligt allar yrkadagar frá kl. 9 til kl. 15.

Sí annars www.almannastovan.fo

HTM HJÁLPARTÓLA-MIÐSTØÐIN
almannastovan
www.almannastovan.fo




P/f Jógvan Weihe
Heil- og smásøla
Stiðjagøta 10 • Boks 1008 • FO- 110 Tórshavn
Telefon 35 38 97 • Fax: 35 38 98
jogvan-weihe@jogvan-weihe.fo • www.weihe.fo